gult24 cyan24 magenta24 svart24



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul av suðri og landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk og um kvøldið regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul av landsynningi og regn, seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur. Sunnudagin hækkar hann upp í landnyrðing. Hitin millum 4 og 8 stig.



*Tann næstan 70 ára gamli Triangel brandbilurin hjá Sløkkiliðnum í Havn verður ein av forkunnugu gestunum í raðkoyringini hjá Føroya Ellisakførum í Havn í sambandi við flaggdagshaldið í dag*

# Gamlir sløkkiliðsbilar til flaggdagshald

**Fyri níggindu ferð fara Føroya Ellisakfør at sýna fram gamlar bilar í sambandi við flaggdagshaldið í Havn**

ELLISAKFØR
*Eirikur Lindenskov*

Síðani 1993 hava limir í Føroya Ellisakførum markerað flaggdagin við at sýna fram gomlu bilarnar undir flaggdagshaldinum í Havn.

Hesaferð eru nógvir »nýggir« gamlir bilar við.

– Vit fara hesaferð serliga at markerað, at vit hava fingið tveir sløkkiliðsbilar úr Klaksvík í varðveitslu, og at Brandstøðin í Havn hevur sett í stand gamla Triangel brandbilin frá tríatiárunum, sigur Brynjálvur Jensen, sum er formaður í felagnum.

Gomlu bilarnir hittast á Statoilstøðini í Gundadali kl 14. Síðani verður koyrt raðkoyring oman á Kongabrúnna, har bilarnir verða sýndir fram undan og undir flaggdagshaldinum á Vaglinum. Eftir røðurnar verður koyrt niðan aftur á Statoilstøðinia í Gundadali, har bilarnir verða vístir fram seinnapartin.

Triangelbilurin hjá Brandstøðini í Havn er sera vakur – og tað er um tað lagið, at hann er tann einasti, ið eftir er av sínum slag. Bilurin er bygdur í Danmark. Hann kom til havnar í 1962, tá hann var um 30 ára gamal. Smiðir á Brandstøðini hava sett bilin í uppruna stand – og er tað arbeiðið sera væl frágingið.

Umfram brandbilarnar verður eisini onkur forkunnug vitjan frá Vatnsoyra Bilasavni, ið hevur fleiri sera forkunnugar bilar, m. a. ein Ford T frá 1922, sum er sama slag, sum fyrsti bilur, ið kom til Føroyar - hin 6. mai 1922.

– Hvørjum bili, teir koma við í dag, vita vit ikki, men vit bíða í spenningi, sigur Brynjálvur Jensen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 9 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 21 |
| New York | 25 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 989 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Bretsku Oyggjunum.




Lágtrýstið yvir Norðsjónum fer spakuliga norðureftir og ein hátrýstryggur í útsynning úr Íslandi verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/04 kl. 06[00]–24/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 23/04 kl. 06[00]–24/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 74,7 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

17. apríl: Mánin longst frá jørðini
23. apríl: Tendring
30. apríl: Fyrra kvarter
2. mai: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. apr | 08.42 | 21.05 | 07.42 | 20.05 | 07.57 | 20.20 | 10.42 | 23.05 | 11.42 | — | 06.57 | 19.20 | 05.57 | 18.20 | 08.57 | 21.20 | 09.57 | 22.20 | 08.27 | 20.50 | 09.42 | 22.05 |
| 26. apr | 09.29 | 21.54 | 08.29 | 20.54 | 08.44 | 21.09 | 11.29 | 23.54 | 00.05 | 12.29 | 07.44 | 20.09 | 06.44 | 19.09 | 09.44 | 22.09 | 10.44 | 23.09 | 09.14 | 21.39 | 10.29 | 22.54 |
| 27. apr | 10.19 | 22.45 | 09.19 | 21.45 | 09.34 | 22.00 | — | 12.19 | 00.54 | 13.19 | 08.34 | 21.00 | 07.34 | 20.00 | 10.34 | 23.00 | 11.34 | — | 10.04 | 22.30 | 11.19 | 23.45 |
| 28. apr | 11.09 | 23.34 | 10.09 | 22.34 | 10.24 | 22.49 | 00.45 | 13.09 | 01.45 | 14.09 | 09.24 | 21.49 | 08.24 | 20.49 | 11.24 | 23.49 | 00.00 | 12.24 | 10.54 | 23.19 | — | 12.09 |